gult6 cyan6 magenta6 svart6



# Útjaðaratingfólk mugu finna saman

**Tað, sum av fjølmiðlunum varð kallað »útjaðarasamgongan« var eitt fruktargott samstarv millum tingfólk úr útjaðaranum. Tað skoraði undir álitini um økismenning og útoyggjar, heldur Jógvan við Keldu. Tí ætlar hann at kalla fólk saman aftur komandi tingsetu fyri at føra verkið víðari**

ØKISMENNING
*John Johannessen*

Tingfólk mugu vera samd um ein felags økismenningarpolitikk í staðin fyri hvør í sínum lag at draga til sítt øki.

Hetta heldur Jógvan við Keldu, sum er valdur tingmaður fyri Fólkaflokkin í Norðoyggjum.

Tí heldur Jógvan við Keldu tað vera eitt gott hugskot, um tingfólk úr útjaðaranum hittast aftur í tí forum, sum av fjølmiðlunum varð kallað »útjaðarasamgongan«, sum av miðstaðarpolitikarum varð kallað »skuggating«, og sum fekk átalu frá tingformanninum.

Sokallaða »útjaðarasamgongan« var eitt tiltak, sum Jógvan við Keldu tók stig til. Talan var um nakrar fundir millum tingfólk í útjaðaranum, har hesi tosaðu um ymisku trupulleikarnir í útjaðaraøkjunum og royndu at koma við boðum uppá, hvussu hesir kundu loysast.

## Ikki ímóti Havnini

Hóast hørðu átalurnar fyrraárið, heldur Jógvan við Keldu tað framvegis vera neyðugt, at tingfólk úr økjunum hittast, fyri at føra nøkur av tilmælunum í álitunum báðum út í verki.

– Orsøkin til, at alt endar í miðstaðarøkinum er, at tá ein nýggjur stovnur verður settur á stovn, peningur skal býtast út til vegagerð ella okkurt líkandi, fara tingfólkini úr útjaðaraøkjunum altíð at togast um, í hvørjum øki, stovnurin ella asfaltið skal liggja, og so endar alt í Havn ella aðrastaðni í miðstaðarøkinum.



*Neyðugt er, at tingfólk úr útjaðaranum finna saman at avtala eitt býti millum ymisku økini, um útjaðarin skal mennast. Tað heldur Jógvan við Keldu, sum er valdur á ting fyri Fólkaflokkin í Norðoyggjum*

–Tað eru tí ikki politikararnir í Havn, ið hava skuldina av miðsavningini, men politikararnir í útjaðaranum, staðfestir Jógvan við Keldu.

Tí heldur hann tað vera neyðugt, at útjaðaratingfólk hittast at viðgera og avtala eitt býti millum økini, so øll økismenning ikki dettur á gólvið av berari kapping millum økini.

– Men fólk mugu gera sær greitt, at eg ætli ikki, at vit skulu hittast fyri at leggja ráð móti Havnini. Vit skulu hittast fyri at menna útjaðaran, staðfestir Jógvan við Keldu.

Men kortini vísir Jógvan við Keldu í sama sambandi á, at Havnin ikki ber alt trýstið, sum er á hana í løtuni, og sum økir kostnaðarstøðið í samfelagnum. Tí verður tað gott fyri báðar partar, um trýstið minkar á Havnina, samstundis sum stuðlað verður upp undir útjaðaran.

## Álitini ikki nóg mikið

Tingmaðurin úr Klaksvík fegnast um bæði økismenningarálitið og útoyggjaálitið. Men hann heldur kortini ikki, at útjaðarin er bjargaður, nú álitini eru gjørd.

– Tað, sum vit nú mugu gera, er at arbeiða víðari frá álitunum. Eg eri ikki samdur við øllum tilmælunum í álitunum báðum. Men tað ger einki. Tí tað er nú, at vit skulu seta okkum saman og viðgera ymisku tilmælini og finna loysnir, sigur Jógvan við Keldu.

Jógvan við Keldur heldur, at serliga nøkur av tilmælunum í útoyggjaálitinum eru heldur víðgongd. Í hansara verð loysir tað ongar trupulleikar, um ein ítróttarhøll verður bygd í Fugloy, eins og álitið mælir til.

Tingmaðurin úr Klaksvík heldur, at frægasta loysnin fyri útoyggjarnar er at skapa karmar fyri ferðavinnu í oyggjunum, seta fólk í fast starv úti á oyggjunum at taka sær av hesum, og síðani skulu ferðafólk gjalda fyri at koma í oynna.

Í hesum sambandi spyrja vit Jógvan við Keldu, um vandi ikki er fyri, at fólk í útoyggjunum av hesum fara at kenna seg sum djór í einum djóragarði, har fólk rinda pening, fyri at koma at síggja tey.

Men tað heldur hann ikki. Eftir hansara fatan, eigur tað at vera sjálvsagt, at tey, sum koma út í útoyggjarnar at njóta og nýta náttúruna, gjalda fyri hetta.

## Nyttar ikki við landsstýrismanni

Í sambandi við kjakið um økismenning hevur Jóannes Eidesgaard skotið upp, at vit fáa ein landsstýrismann í innanlandsmálum, ið burturav skal taka sær av at menna útjaðaran og annars taka sær av kommunumálum.

Løgmaður hevur eisini í sambandi við aðalorðaskiftið um útoyggjaálitið skotið upp nakað líknandi. Løgmaður heldur, at eitt fólk eigur at verða sett í starv á Løgmansskrivstovuni, ið burturav skal taka sær av útjaðaramenning.

Men Jógvan við Keldu ivast í, um hetta er rætta loysnin.

– Tað nyttar ikki bara at seta ein landsstýrismann ella eitt fólk í Havn. Vit mugu hava fólk í sjálvum útjaðaranum umframt útjaðarapolitikarar at taka sær av útjaðaramenningini. Tí er tað rætt at savna saman aftur tingfólk úr útjaðaranum, sigur Jógvan við Keldu.


## Scania P93 til sølu



Árg. 1991. Við nýggjari lift. Hevur isoleraðan kassa (Norfig), og er í góðum standi.

Tlf. 314728


gult7 cyan7 magenta7 svart7



# Hønurnar á Velbastað eru avtiknar



*Annfinn Brekkstein við einari av teimum 3200 hønunum, sum vórðu avtiknar fríggjadagin seinnapart. Um miðan juli verða egg aftur at fáa frá høsnarhúsinum á Velbastað*

**Fríggjadagin vórðu allar 3200 hønurnar í høsnarhúsinum á Velbastað avtiknar, og um ein mánað verður nýtt lið av hønum sett við. Í juli verður farið undir at útbyggja høsnarhúsið, so framleiðsla kann vera alt árið**

HØSNARHÚS
*Stefan í Skorini*

Føroyskir brúkarar fara ikki at hava møguleika at keypa føroysk egg, ið eru framleidd á Velbastað, í einar tveir mánaðir. Orsøkin er hon, at allar hønurnar verða avtiknar, tí tær verpa ikki so støðugt longur, og tí er tørvur á nýggjum og frískum hønum.

Egg av Velbastað verða aftur á marknaðinum um hálvan juli, tá nýggju hønurnar eru farnar at verpa egg til okkum føroyingar.

Um sama mundið verður farið undir annað byggistig í høsnarhúsinum, sum væntandi verður liðugt einaferð fyrst í komandi ári. Tá verður støðug framleiðsla á høsnarhúsinum, tí tá ber til at hava tvey lið av hønum í senn. Tá tað eina liðið verður tikið av, verpur hitt liðið uppá tað mesta. Soleiðis verður útboðið hjá Føroya eggi støðugari.

## 7000 hønur

Nú hevur Føroya egg bara eitt lið av hønum, og tí kann framleiðslan ikki vera so støðug. Tá útbyggingin er liðug, verður eitt lið afturat sett við.

Annfinn Brekkstein, eigari av Føroya eggi, sigur, at 11. juni verða 3200 hønur settar við, og tá annað byggistig er liðugt verður eitt annað lið við 3800 hønum sett við. Tá verða eini 7000 hønur tilsamans í høsnarhúsinum á Velbastað.

Annfinn Brekkstein væntar, at allar 7000 hønurnar fara at verpa nærum 2 milliónir egg um árið.

Hann heldur tað samstundis vera týdningarmikið at kunna hava eina javna framleiðslu, so at egg av Velbastað kunnu vera á marknaðinum allatíðina.

Sum nú er hevur Føroya egg eini 10-12% av tí føroyska marknaðinum, og hesin markaðarpartur skal økjast, heldur Annfinn. Nú verða eini 7 milliónir egg innflutt til Føroya um árið.

– Eg eri sera nøgdur við gongdina higartil, og tað hevur gingið eftir ætlan. Vit hava havt stóran avsetning, og tað hevur eydnast at fáa góða góðsku á eggunum, sigur Annfinn Brekkstein.

## Eiga at framleiða í Føroyum

Nú Annfinn Brekkstein miðar eftir at fáa ein størri part av marknaðinum, leggur hann dent á, at vit í Føroyum eiga at framleiða ein størri part av slíkum vørum.

– Vit innflyta ov nógv til landið sum nú er. Um fortreytirnar eru í lagi, og landið er eitt sindur við, so ber til at framleiða nógv fleiri vørur her í Føroyum, sigur Annfinn Brekkstein.

# Forvenjing til kórstevnu

Árliga kórstevnan verður í ár hildin í Vestmanna í Kristi Himmalferðarvikuskiftinum. Høvuðskórleiðari verður Seppo Murto úr Finnlandi.

Høvuðsverkið verður Te Deum eftir finska tónaskaldið Kaj-Erik Gustafsson. Eisini varða sungnir bæði føroyskir og útlendskir kórsangir. Fyri at lætta um arbeiðið á stevnuni skipar Kórsamband Føroya fyri venjingum frammanundan.

Sunnudagin verður seinna forvenjingin á felagsskúlanum á Oyrabakka frá klokkan 14.30 til 17.30.

# Havnarkórið konsert í Haldarsvíkar kirkju

Í samband við at Havnarkórið fyllir 35 ár, fer kórið út á bygdir at framføra eina jubileumsskrá.

Nú sunnukvøldið fer kórið at hava konsert í Haldarsvíkar kirkju. Skráin er samandráttur av tí sum kórið hevur arbeitt við øll hesi 35 árini. Konsertin í annaðkvøld byrjar kl. 20.00.


Bókin

"Postur í Føroyum 1870 - 2000"

eftir Vilhelm Johannesen



528 bls.

395,-

Fæst til keyps á posthúsunum kring landið!

Eisini ber til at nýta niðanfyristandandi bíleggingarseðil.

Bíleggingarseðil

Undirritaða/i bíleggur hervið _____ eintak/tøk av bókini "Postur í Føroyum 1870 - 2000".

Navn ______________________

Bústaður ______________________

VERÐUR SENT ÓPOSTAÐ (MÓTTAKARIN RINDAR POSTGJALDIÐ)

Hesin lepin verður latin posthúsinum ella lagdur í postkassan.
Bíleggingin verður síðani send tygum við postkravi.
Postverkið rindar postgjaldið.

Postverk Føroya
Postsmoga 3075
110 Tórshavn